# REGLUGERÐ

# fyri

# álitisfólk

Millum Føroya Landsstýri og akademikarafeløgini verður henda reglugerð fyri álitisfólk gjørd.

**§ 1**

Tá tað á einum stovni ella eini deild starvast i minsta lagi 3 limir í einum av akademikarafeløgunum, hava hesir limir rætt til at velja sær eitt álitisfólk, sum ikki kann verða uppsagt, uttan uppsøgnin hevur verið til viðgerðar millum Føroya Landsstýri og avvarðandi felag.

**§ 2**

Tá tað á einum stovni ella einari deild starvast minni enn 3 limir í einum av teimum her nevndu akademikarafeløgum, men í minsta lagi 3 limir í akademikarafeløgunum tilsamans, koma hesir limir undir reglurnar fyri vali av álitisfólki eftir § l, soleiðis at limirnir hava rætt til antin at velja sítt egna álitisfólk ella at velja tað álitisfólkið, sum møguliga er valt eftir § 1, sum sítt álitisfólk.

**§ 3**

Til álitisfólk kann bert veljast tann, ið hevur fulltíðarstarv og hevur arbeitt á viðkomandi stovni ella deild í minsta lagi 1 ár, uttan so at tað av serligum orsøkum gerst neyðugt at víkja frá hesum.

**§ 4**

Valið hevur gildi, tá tað er góðkent av akademikarafelagnum/-feløgunum og fráboðað leiðsluni á avvarðandi stovni. Henda fráboðan eigur at verða gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið.

**§ 5**

Álitisfólkið hevur skyldu at ansa eftir, at lógir, sáttmálar og fyriskipanir, ið eru galdandi fyri arbeiðsplássið sum heild, verða yvirhildin, og skal virka fyri best møguligum samstarvi millum limirnar og leiðsluna.

**§ 6**

Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at tingast við deildar- og stovnsleiðsluna um øll tílík mál, sum av akademikarafelagnum/-feløgunum eru løgd til tess. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerð leiðslunnar, skal tað leggja málið fyri avvarðandi akademikarafelag/feløg.

**§ 7**

Tá talan er um setan av starvsfólki ella uppsøgn, skal leiðslan samráðast við álitisfólkið á avvarðandi stovni ella deild. Verða partarnir ikki samdir, skal álitisfólkið leggja málið fyri akademikarafelagið/-feløgini.

**§ 8**

Álitisfólkið skal - í samráð við stovnin - í arbeiðstíðini hava møguleika fyri at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgunum ella arbeiðsviðurskiftum á staðnum, tó soleiðis, at tað stendst so lítið tarn av hesum sum møguligt.

**§ 9**

Um limur er valdur í nevnd felagsins, skal honum verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum førum, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemju. Formaðurin ella landsstýrið gera stovnin varugan við hesi viðurskifti i hvørjum einstøkum føri.

**§ 10**

Tá álitisfólk og akademikarar søkja um at sleppa á álitisfólkaskeið, fer landsstýrið at viðgera slíkar umsóknir við vælvild.

**Tórshavn, tann 27. februar 1992**

*FØROYA LANDSSTÝRI*

*BÚSKAPAR- OG LØGFRØÐINGAFELAGIÐ*

*MAGISTARAFELAG FØROYA*

*FØROYA VERKFRØÐINGAFELAG*

*FØROYA BYGGIFRØÐINGAFELAG*